# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



TEAM85
VAGNUR JOHANNESEN
Eina hjartaliga tøkk til øll, ið veittu mær stuðul við kommunuvalið.
XA
FÓLKAFLOKKURIN
Kommunan - fyrst og fremst

**Dagurin**

**1. desember. Arnaldur.** Er eitt av teim elstu nøvnunum í halgramanna tali, tað er eitt sindur tvørligt at fáa skil á, hvør hesin Arnaldur hevur verið. Fleiri við sama navni verða nevndir, og teir flestu halda, at her verður sipað til ein franciskanaramunk, sum fór til Kina í 1303 sum trúboðari.
Navnið er gamalt týskt, sett saman av arn, sum merkirørn og Wald, ið merkir tað sama sum føroyska orðið *vald, hersi*.

†

**Alma Samsonsen**
*fødd Midjord*
ættað úr Fuglafirði

Búsitandi í Keypmannahavn, andaðist fríggjadagin 26. november, 70 ára gomul í »De gamles by plejehjem«.

Bønarhald í Danmark og jarðarferð í Føroyum verða lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Hansemann, Jancy, Randi, Finn Fróði og Karin**

Birgith H. Clementsen, Hoyvík:

## 25 ára starvsdag á Vøggustovuni á Konmansmýru

1. desember hevur Birgith H. Clementsen 25 ára starvsdag sum hjálparfólk á Vøggustovuni á Konmansmýru.

Birgith byrjaði á Lützenstrøð í 1979 í Vøggustovuni hjá Nancy Bjõrklund. Fyrst sum avloysari, men bleiv seinni fastsett tann 1. desember, og hevur hon sostatt fylgt gongdini í vøggustovuni gjøgnum hesi ár.

Í 1983 flutti Vøggustovan niðan á Konmansmýru, og her hevur Birgith verið við í teimum broytingum, ið hava verið gjøgnum tíðirnar.

Millum annað vóru børnini fyrr bundin til eitt langt heklað band, tá farið varð túr – tvey og tvey – við einum vaksnum í hvørjum enda.



Birgith er stuttlig og fyrikomandi at arbeiða saman við, altíð fús til eitt spæl, Americano í kaffipausuni, og ongantíð óð tá hon ikki vinnur.

Nógvar góðar søgur eru sagdar, og vónandi hoyra vit fleiri tey næstu árini.

Vit á Konmansmýru ynskja Birgith hjartaliga tillukku á starvsdegnum og bjóða kaffi og køkur á degnum.

Jóa Ziska, Tórshavn:

## 50 ára starvsdag hjá Føroya Tele

Í dag, 1. desember 2004, hevur Jóannes L. Ziska (Jóa) í Havn 50 ára starvsdag hjá Føroya Tele.

Jóa var bert 14 ára gamal, tá hann fekk lærupláss á Telefonverkinum í 1954.

Lærutíðin var trý ar. Í fystuni umvældi hann telefonir og gjørdi annað verkstaðsarbeiði.

Tá læru tíðin var av, arbeiddi hann sum montørur. Alt fleiri fingu telefon, og Jóa fekk til uppgávu at vera »feilrættari«. Tað var at fara út at kanna og umvæla telefonirnar, sum vóru í ólagi hjá fólki. Tað gjørdi hann í nøkur ár, men hann fekk síðani til uppgávu at sita inni á Telefonverkinum og taka ímóti boðum frá viðskiftafólkunum.



Nú er virksemið nógv broytt, men tað er altíð okkurt at takast við, sum Jóa hevur best skil fyri at gera. Eitt nú hevur hann umvælt og snøggað gamlar lutir, telefonir, borð o.a., sum ikki longur eru í nýtslu.

Í dag standa hesir lutir í nýggja virkisbygninginum hjá Føroya Tele og bera boð um upprunan og søguna hjá hesum stovni.

Jóa er tann seinasti, sum er eftir av teimum gomlu á stovninum. Hann sigur um hesi 50 árini, sum er alt hansara vaksna lív, at tað hava verið nógv góð ár við góðum arbeiðsumstøðum og góðum samanhaldi millum starvsfelagar og leiðslu.

Í samband við starvsdagin verður móttøka hjá Føroya Tele í Hoyvík í dag frá kl. 14.00.

Sosialurin
Sosialurin
i

veitst tú ikki tað?
Sosialurin